STARVSLÝSING

## Arbeiðsformaður

Við hesum verður søkt eftir dugnaligum og álítandi arbeiðsformanni til vegaumsitingina hjá okkum í Eysturoynni at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur**
- Røkja og skipa dagliga viðlíkahaldið og vetrarhaldið av landsvegunum í Eysturoynni.
- Skipa arbeiðið í sambandi við størri ábøtur og trygdartiltøk.

Viðkomnadi skal eisini kunna røkja aðrar uppgávur á stovninum, enn tær omanfyri nevndu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum handverkari og royndir innan økið. Stórur dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi dugir at leiða og fyriskipa. Tað er somuleiðis ein fyrimunur at hava tað stóra koyrikortið.

**Setnarviðurskifti**
Løn og setnartreytir annars verða millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er fastlønt.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndir verða at senda til lv@lv.fo ella

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. januar 2007. Merk umsóknina „Formaður til vegadeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árna Jacobsen, økisleiðara, á fartel. 540 920 ella telduposti arnijac@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

# Rannvá Joensen situr við kassan í Rema 1000



*Rannvá Joensen, vinstru megin, gjørdist superstjørna um alt danska ríkið í duettini Creamy*

**Se & Hør í Danmark hevur funnið føroysku Rannvá Joensen, ið gjørdist kend sum helvtin av poppbólkinum Creamy, handan kassan í einum Rema 1000 handli**

NØVN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Blaðið skrivar søguna, um hvussu Rannvá 15 ára gomul forvann sína fyrstu millión. Men at við tveimum børnum og einum manni, ið arbeiðir sum barrvørur, ber ikki til, at ganga heima, peningur skal vinnast, og at hetta er orsøkin til, at hon nú situr við kassan í Rema 1000.

Fyrrverandi poppstjørnan, ið nú eigur tvey børn, er vorðin 21 ára gomul. Í besta paparazzi stíli hevur blaðið tikið eina mynd inn gjøgnum dyrnar á Rema 1000 handlinum í norðurjútsku bygdini Storvorde. Rannvá veit ikki av, at myndin verður tikin, og smílur tí heldur ikki til myndamannin. Hetta fær blaðið at skriva:

– Som billedet af det tidligere popidol med al tydelighed viser, er det da heller ikke lutter smil, der præger den nu mørkhårede sanglærke, når hun sidder ved kasse-apparatet.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Se & Hør gongur privatlívinum hjá Creamy stjørnuni nakað nær.

STARVSLÝSING

## Verkfrøðingar til Landsverk

Við hesum verður søkt eftir tveimum verkfrøðingum. Einum til vegadeildina og einum til framleiðsludeildina at seta sum skjótast.
Vit kunnu bjóða spennandi og áhugaverd størv, ið eru fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

### Verkfrøðingur til vegadeildina

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
- Planlegging
- Prosjektering
- Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av vega-, brúgva- og tunnilsprosjektum
- Eftirlit við verkætlanum
- Gera ætlanir fyri ferðslutrygdartiltøk
- Myndugleikaumboðan
- Luttaka í norðurlendskum samstarvi innan økið

Viðkomandi skal eisini kunna røkja aðrar uppgávur á stovninum, enn tær omanfyri nevndu.

**Førleikakrøv**
Vegadeildin sóknast eftir verkfrøðingi við royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Royndir at arbeiða við KT-forritum á brúkarastøði er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist.

### Verkfrøðingur til framleiðsludeildina

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
- Yvirskipaða raksturin av skervverkunum saman við formonnunum á verkunum kring landið.
- At skipa fyri viðlíkahaldi og dagføring av verkunum kring landið.
- Gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og verklagsarbeiðum.

**Førleikakrøv**
Framleiðsludeildin sóknast eftir einum fólki við útbúgving sum verkfrøðingur ella aðrari viðkomandi útbúgving. Viðkomandi skal hava áhuga at arbeiða við KT. Royndir við at arbeiða við Excell-rokniarki og Word er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
FO–110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. januar 2007. Merk umsóknina „Verkfrøðingur til vegadeildina“ ella „Verkfrøðingur til framleiðsludeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið á vegadeildini kunnu fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, deildarleiðara, á fartel. 540 881 ella teldupost he@lv.fo.

Nærri upplýsingar um starvið á framleiðsludeildini kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á fartel. 540 841 ella teldupost to@lv.fo.

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur, byggiharrauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK byggir land

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo